## Rangers er í UEFA Cup finaluni

Einki mál kom í vanligu leiktíðini, hvørki í fyrru ella seinnu hálvfinaluni í UEFA Cup-kappingini. Í yvirtíðini í Firenze kom heldur einki mál, og tí var neyðugt við brotssparkskapping. Fiorentinamálverjin, Sebastian Frey bjargaði brotssparkinum hjá Barry Ferguson, sum var fyrstur at skjóta. Men Fabio Liverani og veteranurin, Christian Vieri brendu fyri Fiorentina, og tá hinir 4 brotsparksskjúttarnir hjá Glasgow Rangers greiddu sín setning, eru skotarnir klárir til finaluna ímóti Zenit Sankta Pætursborg, sum verður á City of Manchester Leikvøllinum mikukvøldið 14. mai.



## Ovurfegin Smith

Tað kann væl vera, at Fiorentina hevði uppiborið betri. Men vit einum ótrúliga stríðsvilja megnaði Glasgow Rangers at standa móti trýstinum. Og tað var einki at siga til, at venjarin hjá felagnum var væl nøgdur eftir sigurin.- Hetta var eitt fantastiskt úrslit, og eg eri ovurfegin vegna øll í og kring felagið. Vit vistu av, at vit komu undir trýst, men vit megnaðu at halda høvdinum kalt segði Sir Walther Smith um sínar spælarar, sum veruliga stríddu seg gjøgnum ódnarveður í Firenze, segði Walther Smith eftir minniliga sigurin í brotssparkskappingini.

NSÍ-ÍF 3-2 (0-1):

# NSÍ upp á tindar og gjøgnum dalar

*NSÍ*

*ÍF*

**Sjáldan fara spælarar og fjepparar eftir lítlari løtu ígjøgnum so stór kenslulig sveiggj, sum NSÍ og ÍF spælarar og viðhaldsfólk fóru tað við Løkin mikukvøldið**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*



*Tað var um hár gjørt, at ÍF tók stig við sær móti meistarunum, hóast teir móti dystarenda vóru undirmannaðir við tveimum spælarum. Brotssparkið í yvirtíðini varð tó misnýtt, og so fekk NSÍ øll stigini*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Um fótbóltsundirhald verður vigað í málum og brotsspørkum, so var 2. hálvleikur í oyggjauppgerðini millum NSÍ og ÍF í Runavík so undirhaldandi, sum tað ber til at ímynda sær. Harafturat var intensiteturin stórur, og tað gjørdist eyka dramatiskt, tá ið tveir fuglfirðingar í sama minutti vórðu riknir av vøllinum.

Dramatikkurin var so stórur, sum tað næstan ikki ber til at rokna við í yvirtíðini. Eina løtu vóru fuglfirðingar omaná, so tey á Skálafjørðinum, so aftur teir reyðu og so teir gulu, meðan teir reyðu rættuliga hingu við nevinum, tá ið síðsta bríkslið hevði ljóðað.

Í desperatari roynd at fáa fulla úrtøku varð NSÍ liðformaðurin Óli Hansen, sum frammanundan hevði skorað tvær ferðir úr ellivu metrum, fluttur í fremstu røð. Meiri enn minuttur var farin av yvirtíðini, tá ið liðformaðurin á rangstøðumarkinum heilfluktaði í málið.

3-2 til heimaliðið, og tað kendist sum um, at nú var ballið buðið hjá ÍF, sum hevði svarað aftur og javnað til 2-2, eftir at teir høvdu mist tveir menn! Málskjútti í tí førinum var Bartal Eliasen, sum vísti framúr hugburð og saman við eyðsýnda Høgna Madsen á miðvøllinum tók einastandandi ábyrgd á seg, tá ið mest stóð til. Av brotsteigarmarkinum í høgru smekkaði hann bóltin upp í handara hornið.

Men ballið var ikki buðið hjá ÍF, hóast stóra vónbrotið, sum 3-2 leiðslan í yvirtíðini var fyri teir. Dómarin peikaði fyri triðju ferð á ellivu metra blettin, og vongverjin í høgru, Áki Petersen, sendi bóltin á tvørtræið. So bríkslaði dómarin fyri síðstu ferð, og áskoðararnir mundu ivaleyst vera eins pøstir, sum spælarar ofta kenna seg. Tað hevði verið dramatikkur fyri allar pengarnar.

Brotssparksdómarnir hava fingið og fáa ivaleyst stóra umrøðu. Tá ið Óli Hansen, sum við trimum málum gjørdist dagsins maður hjá heimaliðnum, javnaði til 1-1, var tað við brotssparki, sum linjudómarin hevði veittrað fyri. Innskifti Øssur Dalbúð stútaði, og bólturin kom í armin hjá Bartali Eliasen. Tá ið Óli Hansen við brotssparki legði NSÍ við ellivu monnum framum teir níggju fuglfirðingarnar, hevði dómarin bríkslað, tí hann metti, at Bartal Eliasen hevði togað Øssur Dalbúð niður.

Áki Petersen fekk møguleikan úr ellivu metrum, tí dómarin metti, at Johan Troest Davidsen hevði skumpað óregluliga í brotsteiginum.

Í spennandi steypadystinum ímóti HB fyrr í ár umsetti Áki Petersen tvær ferðir brotsspark til mál, men hesa ferð kiksaði hann:

- Hetta var orduliga súrt. Spælið flýtur væl hjá okkum, og eg haldi avgjørt, at vit eiga at fáa í hvussu so er eitt stig. Men heldur ikki hesa ferð vóru marginalirnir við, staðfesti óføri miðvallarin Høgni Madsen.

Hvør er orsøkin til, at spælið gongur so væl?

- Vit tora at hava bóltin og at bjóða okkum til. Harvið verður minni trýst á liðnum, enn tað hevði verið, um vit sparkaðu bóltin fram og so beinanvegin vórðu settir undir trýst av mótstøðumonnunum, heldur Høgni Madsen, sum avgjørt roknar við, at uppaftur fleiri stig fara at koma, um tað fer at eydnast at halda fram við leikgongdini, sum hevur verið higartil.

Fyrstu ferð fuglfirðingar vóru á tindinum var lítla løtu undan hvíldini, tá ið Nenad Saric úr vinstru sneiddi framvið tveimum, áðenn hann við fínum skoti sendi bóltin upp í handara málhornið.

Í Runavík fegnast teir sjálvandi yvir øll stigini. Sammett við meistaraárið í fjør restar nógv í leikliga, men tað boðar frá dygdum hjá toppliði, tá ið tað uttan gott spæl eydnast at vinna fulla úrtøku og harvið at vera millum toppliðini.

At venjarin ikki er nøgdur sæst aftur í, at hann skiftir fólk. Tað plagar ikki at vera honum fyri. Hesa ferð vóru Einar og Dejan settir uttanfyri. Í borðunum eru verjutrupulleikar, og framrættaða spælið er ikki, sum tað hevur verið.

## Fimleikalist í Norðurlandahúsinum

**Flik-flak við fúkandi ferð, søgan um Jeanne d´Arc í rørlsum og myndum, kulur Hip Hop dansur, og mangt annað hugtakandi verður at síggja í Fimleikalistini**

FIMLEIKUR
*tíðindaskriv*

Í fjør sá Fimleikalistin fyrstu ferð dagsins ljós, og eydnaðist hon so mikið væl, at fyrireikarnir avgjørdu at hava hana aftur. Eins í fjør eru tey luttakandi liðini vald á árligu fimleikaframsýningunum hjá Havnar fimleikafelag. Hesi hava víst eitt hvørt serstakt sum fyrireikingarbólkurin hevur mett passaði væl til Fimleikalistina.

Hvat er Fimleikalist? Jú, Fimleikalistin er ein fimleikalig uppliving, har áskoðarin, í ein góðan tíma, fær høvi at uppliva tað besta í kappingarfimleikinum og tað besta í breiddarfimleikinum. Fimleikarar á høgum støði vísa fantastiskar og forvitnisligar rørslur og verður tiltakið kryddra við ymiskum, sum ikki verður avdúkað her.

Við hesum vil nevndin í Havnar fimleikafelag vísa almenninginum, hvussu nógv fimleikurin í Føroyum hevur ment seg seinastu árini, og vil á henda hátt varpa ljós á fimleikin og listina, sum tað í veruleikanum er.

Einans tvær sýningar verða 18. mai. Tann fyrra kl. 15 og tann seinna kl. 18.



*Talan var um framúrskarandi framsýningar, tá Fimleikalistin í fjør var koyrd av barkastokki*
*Mynd: Hannis P. Wardum*

# Talvfinalur um vikuskiftið

**Grand Prix Finalan í talvi, verður telvað leygardagin í hølum Havnar Telvingarfelags**

TALV
*Tíðindaskriv*

Talan er um ta 9. GP-kappingina í røðini, síðani kappingin byrjaði seinasta heyst. Undirtøkan hevur verið góð og kappingin er skipað soleiðis, at til tess at fáa GP-plasering, krevst at luttikið er í Finaluni og 5 undankappingum. Í Finaluni verða telvað 9 umfør, har hvør telvarin hevur 15 minuttir í part til talvið.

Undan finaluna liggur Olaf Berg úr Sandavágs Talvfelag best fyri - 3 stig fremri enn Ólavur Simonsen úr Klaksvíkar Talvfelag, sum samstundis er í harðari kapping um at halda fast um 2. plássið við Torkil Nielsen úr Sandavágs Talvfelag, meðan Finnbjørn Vang úr Klaksvíkar Talvfelag er nakað aftari, men tó hevur møguleikar.

Telvað verður somuleiðis um Grand Prix styrkisvirðislønir, sum merkir, at telvarar verða býttir upp í styrkisbólkar og kappast innanhýsis í sínum styrkisbólki um GP-plaseringar.

Røgvi E. Nielsen, úr Sandavágs Talvfelag, verður uttan iva vinnari av 1. styrkisvirðislønini, meðan kappingin er sera hørð um 2. styrkisvirðislønina, ímillum Jónfinn Thomsen úr Sandavági og Hjalta Toftum Jógvansson úr Havnini. Høgni E. Nielsen úr Sandavági liggur sera væl fyri at vinna 3. styrkisvirðislønina, í kapping við Herborg Hansen, Vagnur Dam og Einar Gregersen. Spennandi kapping verður ímillum Johan Hentze úr Sundalagnum, Heðin Gregersen úr Klaksvík og Sáru Traber Olsen úr Havn um 4. styrkisvirðislønina.

Sostatt eru ábendingar um, at Sandavágs Talvfelag, kann gerast heilt stóri sigursharrin, tá seinasti leikur í Grand Prix 07/08 er leiktur leygardag seinnapart.